# LÝSING FRÁ REYÐA KROSS FØROYA

**HANDIL VIÐ BÓKUM** við inngongd í Vágsbotni. Vit sóknast eftir persóni at samskipa arbeiði við bókhandlinum, sum hevur 17 hjálparfólk. Handilin stendur ómannaður. Keyparin rindar við at leggja peningin í eina bússu. Leiðarin skal skipa vaktirnar fyri upp- og afturlating, sortering og uppsetan av bókum og hava eftirlit við at mannagongdir vera fylgdar. Ein sera áhugaverd uppgáva. Øll arbeiða sjálvboðin.

**SKEIÐ Í 1. HJÁLP**
Ynskir tú at læra 1.hjálp hevur tú nú høvi til hetta.
Reyði Krossur Føroya skipar fyri 12 tímar grundskeiðið í 1. Hjálp í húsinum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni.
06.03.09 kl. 18:00-20:00
07.03.09 kl. 10:00-17:00 (1 tími til mat)
14.03.09 kl. 16:00-20:00
Kostnaður kr. 700,00 fyri hvønn
Skeiðleiðari: Bo Warberg (283629)

**ENDURNÝTSLUHANDIL VIÐ KLÆÐUM**, skóm, brúkslutum og ymiskum skreyt- og príðislutum við inngongd frá Bryggjubakka. Vit sóknast eftir persóni at samskipa arbeiði við endurnýtsluhandlinum, sum hevur 26 hjálparfólk. Sum er, er handilin opin gerandisdagar kl. 13:30-17:30 og leygardagar kl. 11:00-14:00. Leiðarin hevur ábyrgdina av at seta fólk og greiða frá uppgávum og ansa eftir at mannagongdir vera fylgdar. Ein sera áhugaverd uppgáva, har øll arbeiða sjálvboðin

Hava tit áhuga í nøkrum av hesum, ella at fáa upplýsingar um, hvørjar aðrar uppgávur eru, vend tær til:
Súna Vinther tlf. 283630 ella t-post: Suni@redcross.fo

**Reyði Krossur Føroya**
Postbox 1015 | Bryggjubakki 10 | Tel 319630
Fax 311217 | T-Post: redcross@redcross.fo

# TIL SØLU

**Lastbilar**
Scania 113 6x4 dumpari
Scania 143 6x2 weirheis
Dumparalast
Gardinlast
Vanlig last v/síðuvippu
Flatlast (krók/weir)
Bingja 9 m³ (krók/weir)
Bingja 14 m³ (krók/weir)
Bingja 17 m³
20 fót ISO-bingja (goymslu-)
MAN 14.220 v/maskinlast (8 tons)
MAN 10.153 v/vippu og krana (5tm)

**Gravimaskinur**
Hitachi Zaxxis 8 tons
við hamara, 3 skuffum 2400 tím

Komatsu pc 09
við innb. hamara 0,9 tons

Peljob 2,8 tons
4 skuffur + hamara (nýggjan motor)

**Tlf. nr. 21 21 04**

Vágs Kommuna

## Avloysari til Skúlatannlæknastovuna í Vági

Søkt verður eftir avloysara fyri tannarøktara í farloyvi.

Starvið er hálvtíðarstarv og verður at sett skjótast tilber.

Ynskilig er, at umsøkjarin hevur hóskandi útbúgvin innan tannarøkt.

Meira fast at vita um starvið, við at venda sær til Magna Eidesgaard tlf. 373126.

Umsókn saman við prógvum og upplýsingum um royndir verða í seinasta lagi tann 6. mars 2009 kl. 12.00 at senda til: Vágs kommunu, Vágsvegur 22, 900 Vágur.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

## Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum

**Eitt starv sum skúlatænari er leyst at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá 1. apríl 2009.**

**Uppgávur**
Á skúlanum eru 3 skúlatænarastørv og uppgávurnar eru: Umsjón við og røkt av bygningunum hjá stovninum, at røkja økið uttan um bygningarnar, eftirlit við hita-, vatn- og elskipan skúlans og at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa í dagligu viðurskiftum skúlans. Skúlatænararnir arbeiða í skiftandi vaktum og tí koma skeivar arbeiðstíðir regluliga fyri. Á skúlanum koma frá 1. apríl at starvast 2 skúlatænarar í fullum starvi og 2 í hálvum starvi, og nýggi skúlatænarin vísir til verandi 1. skúlatænara, ið er leiðari hjá skúlatænarunum og reingerðarstarvsfólkinum.

**Førleikar**
Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur telduførleiki er ein fyrimunur. Somuleiðis er tað ein fyrimunur, men ikki eitt krav, um umsøkjarin hevur góðan førleika at handfara elektriska útgerð, s.s. teldur, ljóðútgerð og ljósútgerð. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvið verður at seta frá 1. apríl ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973 ella Gunnar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. mars, kl. 12.00.

